Juni 2026

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

PERSÓNLIG VIÐURSKIFTI

# Jarðarferð

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt





## Jarðarferð úr Kirkjugarðskapellinum

Tórshavnar kommuna eigur Kirkjugarðskapellið, sum er ókeypis at nýta til jarðarferð hjá øllum í kommununi.

Mannagongdin er tann sama sum undir kirkjuligari jarðarferð, og avvarðandi skulu sjálvi syrgja fyri at biðja sangarar og útvega berarar. Tó skalt tú sum avvarðandi sjálv/-ur biðja urguleikara, tá jarðarferðin er úr Kirkjugarðskapellinum.

## Aðrar tænastur

Ynskja tit at lýsa andlátið í útvarpinum, skulu tit senda ein teldupost til Kringvarp Føroya á andlat@kvf.fo



PERSÓNLIG VIÐURSKIFTI

# Jarðarferð

**Góðu avvarðandi. Hetta skjalið er ætlað at hjálpa tykkum at koma ígjøgnum praktisku viðuskiftini viðvíkjandi jarðarferðini, tá ið ein av tínum kæru doyr. Tað fyrsta, sum tit skulu gera, er at boða presti ella samkomuleiðara frá andlátinum. Presturin ella samkomuleiðarin vegleiðir tykkum um øll liðini í samband við jarðarferðina.**

Presturin ella samkomuleiðarin vegleiðir somuleiðis um øll liðini í samband við jarðarferðina saman við tykkum.

Deyðavátttan skal latast kirkjubókaførandi sóknarprestinum í prestagjaldinum, har deyði hevði skrásettan bústað. Skal annar prestur enn hesin sami kirkjubókaførandi presturin jarða, skal avrit av deyðavátttanini latast tí prestinum umframt.

Er talan um fólk, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni, skulu avvarðandi kortini lata deyðavátttanina til sóknarprestin, ið førir kirkjubøkurnar í prestagjaldinum.

Prestur ella samkomuleiðari vegleiðir víðari um, hvussu farast skal fram.

Avvarðandi fáa sjálv til vega kistu og líkverju fyri egnan kostnað. Sjúkrarøktarfrøðingar/heilsustarvsfólk hjálpa at gera líkið klárt og leggja í kistu.

Er andlátið á sjúkrahúsi, skal avvarðandi venda sær til Uttanlandstænastuna, sum vegleiðir um viðkomandi mannagongd.

## Viðkomandi telefonnummur

Uttanlandstænastan á Landssjúkrahúsinum, tel. 304500.

Suðurstreymoyar eystara prestagjald (Havnar kirkja, Nólsoyar kirkja), tel. 313900.

- Maria Jørðdal Niclasen, kirkjubókaførandi, tel. 237349
- Anne Mette Greve Klemensen, tel. 237344
- Steintóra Gleðisheygg Joensen, tel. 237332

Suðurstreymoyar vestara prestagjald (Vesturkirkjan, Argja kirkja, Kirkjubøar kirkja, Hests kirkja), tel. 314251.

- Heri J. Joensen, kirkjubókaførandi, tel. 237330
- Bergur Debes Joensen, tel. 237331
- Derhard Jógvansson, tel. 237347
- Hanus á Gørðum, sjúkrahúsprestur, tel. 237346

Suðurstreymoyar norðara prestagjald (Hoyvíkar kirkja, Kaldbaks kirkja), tel. 319525.

- Theodor Eli Dam Olsen, kirkjubókaførandi, tel. 237337
- Bergtórur Bjarkhamar, tel. 237338

Kollafjørður hoyrir til Norðurstreymoyar prestagjald, tel. 421214.

## Jarðarferð

Er jarðarferðin úr kirkju ella samkomuhúsi, skulu avvarðandi venda sær til prest/samkomuleiðara og avtala tíð fyri jarðarferðini. Avvarðandi velja saman við presti/-samkomuleiðara teir sálmar ella sangir, ið sungnir verða. Avvarðandi syrgja sjálvi fyri at prenta sanghefti, um tey ynskja tílík.

Harumframt skalt tú sum avvarðandi sjálv syrgja fyri:

- At biðja sangarar
- At útvega berarar
- Prýði til kirkjuna/samkomuna
- Flutningi at koyra kransar og blómur úr kirkjuni/-samkomuni til kirkjugarðin